# Telefonbókin 2011

## Seinasta freist at lata inn broytingar til Telefonbókina 2011 er týsdagin 1. februar 2011

Í juni 2011 verður Telefonbókin borin út til allar fastnetstelefonfelagar. Verandi og nýggj virki, handlar og stovnar, sum vilja nýta møguleikan at lýsa á Gulu síðum, skulu boða frá hesum – bæði um talan er um nýggjar lýsingar, ella um hildið verður áfram við teimum verandi.

### Hvítu síður

Týsdagin 1. februar 2011 er seinasta freist at lata inn broytingar til Hvítu síður í Telefonbókini 2011 (vanliga telefonyvirlitið).

**Prísir**

| | |
|---|---|
| Eykaupptøka | 62,50 kr. |
| Undirupptøka | 62,50 kr. |
| Undirstriking | 62,50 kr. |
| Búmerki | 3.750,00 kr. |

**Allir prísir eru við mvg.**

**Kontakt**
**kundaskraseting@ft.fo, tel. 80 80 14, faks 32 10 91**

### Gulu síður

Týsdagin 1. februar 2011 er seinasta freist at boða frá av nýggjum, um ein ynskir upptøku í Gulu síðum.

**Prísir**

| | |
|---|---|
| Eykaupptøka | 62,50 kr. |
| Undirupptøka | 62,50 kr. |
| Undirstriking | 62,50 kr. |
| Grafisk lýsing, grundgjald | 1.750,00 kr. |
| Innrammað lýsing, grundgjald | 1.250,00 kr. |
| Grafisk ella innrammað lýsing, fyri mm (min. 30 mm) | 37,50 kr. |

**Allir prísir eru við mvg.**

**Kontakt**
**lysingar@ft.fo, tel. 30 30 30, faks 30 30 31**

FØROYA TELE

SENDISTOVAN

STARVSLÝSING

# Kontrollari til fíggjardeildina á Landsverki

Søkt verður eftir kontrollara til Landsverk at byrja 1. mars ella skjótast til ber.

**Starvið**
Høvuðsuppgávan hjá fíggjardeildini er at fyriskipa og samskipa fíggjarligu viðurskiftini á stovninum og at hava eftirlit við, at innan- og uttanhýsis játtanirnar halda.

Sum kontrollari kemur tú sertakliga at varða av:

- eftirliti við byggiroknskapum
- váðameting av verkætlanum
- eftirliti við avtalugrundarlagi
- eftirliti við faktureringsætlanum
- eftirliti við, at játtanir verða hildnar
- og øðrum fyrifallandi uppgávum á fíggjardeildini

**Førleikakrøv**
Tú hevur viðkomandi hægri útbúgving innan roknskap. Til dømis HD, HA ella cand.merc. Ert tú verkfrøðingur ella líknandi við eftirútbúgving og drúgvum royndum innan roknskap, eru vit eisini áhugað at hoyra frá tær.

Royndir innan oman fyri nevndu uppgávum og/ella innan grannskoðan er ein fyrimunur. Haraftur-at er tað fyrimunur at hava innlit í byggivinnuna, byggiløgfrøði og gongdina í byggiverkætlanum.

Tú dugir at varðveita yvirlitið, men evnar eisini at fara niður í smálutir. Tú ert førur fyri at seta kritiskar spurningar umframt at eftirkanna og meta um roknskaparligu mannagongdirnar. Sum persónur ert tú diplomatiskur og samstarvandi. Tú dugir væl at lurta eftir fólki, men tú ert eisini áhaldandi og megnar at skera ígjøgnum, tá tað er neyðugt.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Arbeitt verður skiftitíð.

**Umsóknir**
Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verður at senda til lv@lv.fo og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 31. januar 2010, kl. 08.00. Merk umsóknina „*Kontrollari*“.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Árant Andriasson, fíggjarleiðara, á telefon 290 821 ella við at senda ein teldupost til arant@lv.fo

*Landsverk er undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*

*Við umleið 140 starvsfólkum er Landsverk ikki bert ein av størstu almennu stovnunum í Føroyum, men eisini millum teirra, sum hevur størstu serfrøðina savnaða undir sama taki.*

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, 110 Tórshavn | Tel. 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

SENDISTOVAN